# Flaggdagshald um branding

Jógvan við Keldu, fyrrverandi borgarstjóri og løgtingsmaður, helt flaggdagsrøðuna í Klaksvík fríggjadagin. Veðrið var hampuligt, og hóast tað sirmaði meðan skrúgongan gekk úr Klaksvíksgarðinum heim í Vág, so sleit í, tá løtan byrjaði framman fyri skýlinum við vøllin í Djúpumýru. Flaggdagshaldið í Klaksvík hevur vanliga verið hildið í Vágstúni, men ár var tiltakið flutt til eitt meira veðurgott men minni sjarmerandi pláss. Jógvan við Keldu samanbar Merkið við búmerkini hjá Mærsk og Microsoft, sum fólk knýta at dygd, og gamla flaggið hjá farna Sovjetsamveldinum, sum fekk tað at ganga kalt niður eftir rygginum, sum røðarin málbar seg. Tí hevur tað týdning, hvørjum innihaldið, vit branda okkum við, segði fyrrverandi landsstýris- og løgtingsmaðurin. (Mynd: Tóra við Keldu)



*- Listin er tann kreativa lívsæðrin. Hon lærir okkum at hugsa ótraditionelt, og hetta smittar av til restina av samfelagnum*

*- Politikarar vita í dag, at ein íløga í listina er ein íløga í samfelagið, men teir mangla eldhugin og galskapin at føra hesa vitan út í lívið*

*- Mínar royndir í Danmark hava gjørt meg betri, enn eg trúði, at eg var. Í Føroyum eru eru møguleikarnir avmarkaðir*



*Eyðun Johannesen hevur fingið fleiri viðurkenningar fyri sítt arbeiðið innan danska og føroyska leiklist. Her er tað Joakim prinsur, sum útnevnir hann til H.C. Andersen ambassadør. Mynd: Polfoto*

## FAKTA

Eyðun Johannessen er føddur 28. apríl 1938. Hann hevur sjónleikaraútbúgving frá Kongaliga Leikpallinum og Odense Teater frá 1960.
Í 1961 fór hann undir at halda sjónleikaraskeið hjá Havnar Sjónleikarafelag og sjónleikarafeløgum kring landið. Í árunum 1970-73 var hann sjónleikari og leikstjóri við Århus Teater. Hann kom heimaftur í 1973, og var settur sum sjónleikaráðgevi av landsstýrinum. Í 1977 var hann við til at stovna yrkisleikbólkin "Gríma".
Í árunum frá 1979-87 var hann rektari á sjónleikaraskúlanum við Århus Teater.
Síðan byrjaði hann sjálvstøðugt virksemi sum leikstjóri, til hann í 2000 var settur sum listarligur leiðari fyri Leikhúsinum Gríma. Í 2005 flutti hann aftur til Danmarkar.
Eyðun Johannessen kom á donsku fíggjarlógina í 1994, í 2001 fekk hann Mentunarvirðisløn Landsins, og í 2005 varð hann útnevndur til H.C. Andersen ambassadør.

# Føroysk leikrit ein mangulvøra

**Føroyskir rithøvundar er stokk konservativir og síggja ikki virði í at skriva leikrit. Hetta heldur Eyðun Johannesen, sum síðani hann sum fyrsti føroyingar varð útlærdur sjónleikari í 1960, hevur arbeitt fyri at menna føroyska leiklist**

MENTAN
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Leiklistin gevur fólki møguleika at síggja sítt egna lív í øðrum hami og frá øðrvísi sjónarhorni. Tí hevur tað týdning, at leikrit verða skrivað úr einum føroyskum sjónarhornið. Men føroyskir rithøvundar skriva bara bøkur, staðfestir Eyðun Johannesen, leikstjóri.

Hóast hann fegnast um, at góðir útlenskir klassikarar verða umsettir til føroyska leikpallin, so hevur tað sambært Eyðuni Johannessen minst líka stóran týdning at fáa uppruna føroysk leikrit.

- Vit mugu hava føroyskar leikrithøvundar, tí leiklistin er altíð lokalt forankrað. Eg havi júst verið og hugt eftir leikinum, Orðið, hjá Kaj Munk. Og hesin leikur er framvegis líka brennandi, men hann verður so at siga bara leiktur í Danmark, tí tað er hetta samfelagið, hann endurspeglar. Nakrir sjónleikir verða universiellir klassikarar, men tað lokala hevur eisini stóran týdning. Og tað eru bara føroyskir rithøvundar, sum kunnu skriva um føroysk viðurskifti, heldur undangongumaðurin innan proffesionella føroyska leiklist, sum í dag fyllir 70 ár.

### Rithøvundar mugu taka sær um reiggj

At Føroyar eru eitt lítið máløki er sambært Eyðuni Johannessen ikki nøkur undarførsla fyri ikki at hava útbúnar og dugnaligar leikrithøvundar.

- Føroysk blaðfólk fáa sína útbúgvin uttanlanda, og tað eru nógvir góðir dramaturgiskúlar í bæði Danmark, Onglandi og USA, har føroyingar kundu útbúgva seg.

- Leiklistin endurspeglar samfelagsmenningina, og við sjónleikinum fáa vit møguleika at spegla okkum í øðrum enn amerikanskum sjónvarpsrøðum. Men vit mangla uppruna føroysk leikrit.

- Eg haldi, at skrivandi fólk í Føroyum skulu taka seg um reiggj. Føroyskir rithøvundar eru so stokk konservativir, at teir síggja bert virði í skaldskapi, sum kemur út í bók.

- Vit hava brúk fyri, at føroyskir rithøvundar fáa trongd og hug at skriva sjónleikir. Og tað er tørvur á, at fleiri fara á leikrithøvundaskúla. Tað skal meira enn eitt lítið skeið til. sigur Eyðun Johannessen, sum sjálvur hevur verið við til at skipa fyri dramaturgiskeiðum fyri skrivandi føroyingum

vinna, og eg væntaði ikki at eg fór at fáa tilboð um at leikstjórna stórum leikum, tá eg flutti niðuraftur fyri trimum árum síðani. Men eg havi framvegis hug og orku, og tað vísti seg, at eg var ikki gloymdur.

### Geva ungum hug at útbúgva seg

Eyðun Johannesen fegnast um, at føroyski Tjóðpallurin varð settur á stovn í 2003, men hann leggur dent á, at ein tjóðpallur ikki er nokk í sær sjálvum.

– Tað skal meir enn bara ein stovnur til. Tað má vera lønsamt at arbeiða sum sjónleikari, og pengar skulu til góðar uppsetingar.

Hann samanber tað við Kringvarpið. Tað er ikki nokk bara at hava ein stovn. Fólkini skulu eisini hava umstøður og pláss at skapa.

- Um sjónleikarastarvið er eitt lálønar starv við fáum avbjóðingum, fáa ung ikki hug at velja sær eitt slíkt lívsstarv. Og um føroysku leiklistini skal vera lív laga, mugu ungir føroyingar fáa hug at ganga hesa leið

- Skal føroysk leiklist vera á einum høgum støði, mugu vit hava útbúgvin fólk. Sjónleikur er meira enn skemt at flenna at, og skulu vit hava eitt støði, sum kann javnmetast við onnur lond, skal professionalisma til, staðfestir Eyðun Johannesen og leggur áherslu á, at hann ikki tosar um stórar dýrar leikir.

- Tað týdningarmesta er, at vit hava dugnalig fólk, sum fáa fíggjarligar umstøður at skapa list á høgum støði.

## Gylta Kumpassin

Fantasy triologiin hjá Philip Pullman er umsett til fleiri enn 20 ymisk mál og gjørd til bæði sjónleik og film. Bøkurnar eru eisini umsettar til føroyskt við felagsheitinum Myrkursins Frumevni. Sjónleikurin er í tveimum pørtum og varð frumframførdur í London í 2003 undir heitinum His Dark Materials.

Í heyst verður tann fyrri parturin sýndur á Store Scene í Århus Teater, meðan seinni parturin verður settur upp komandi ár. Og føroyski leikstjórin og dagsins føðingardagsbarn skal standa á odda fyri báðum uppsetingunum.

Eyðun Johannesen skal leikstjórna 42 sjónleikarum og samstarva við eysturrískan scenograf og danskan komponist. Harumframt vera eisini týskir dukkuserfrøðingar við, tí dukkusjónleikur er eisini uppií.

-Eg havi ofta sagt, at eg fór at fáast við dukkusjónleik, tá eg var pensioneraður og ikki longur arbeiddi sum leikstjóri. Men við hesum leikinum sleppi eg at royna dukkurnar, longu áðrenn eg gevist sum vanligur leikstjóri, sigur Eyðun Johannesen flennandi.

Triologiin hjá Philip Pullmann hevur fingið fleiri heiðurslønir, millum annað stórsta bretska barnabókaheiðurin, The Carnegie Medal, umframt Whitbread Book of the Year og stóra altjóðu bókavirðislønina, Astrid Lindgren Prísin.

